## Beckham aftur til Milan

Eftir tingingar í nakrar vikur, gjørdist í gjár endaliga greitt, at enski landsliðsspælarin, David Beckham, aftur í vetur verður læntur út til italska stórfelagið, AC Milan. 34 ára gamli miðvallarin, sum roynir at varðveita plássi í enska HM-hópinum, verður til láns frá sínum amerikanska felag, LA Galaxy, seinnu hálvuna av italska kappingarárinum. Avtalan minnir um hana í fjør, tá Beckham skoraði tvey mál í 18 dystum fyri AC Milan.



## OL møguliga til Dubai

Sheik Mohammed bin Rashid Al Maktoum og sonur hansara, krónprinsurin Sheik Hamdan bin Mohammed bin Rashid Al Maktoum, vilja hava olympisku leikirnar til Dubai í 2020. Teir báðir valdsfeðgarnir hava tikið stig til fleiri fundir á hægsta stigi, sum hava til endamáls at tryggja ríka golfstatinum ein møguleika at teljast millum teirra, ið skulu kappast um at sleppa at hýsa OL. Ein annar golfstatur, Qatar, var inni í myndini sum umsøkjari til leikirnar í 2016.

# tlari kapping

øllum amboðum, uttan á gólvinum, har hann mátti lúta fyri Øssuri Eiriksfoss, var Rósing Dam.

### Yngri konufólk

Kappingin hjá kvinnuunglingum var avgjørd, áðrenn kappingini byrjaði, men hjá gentum og pinkum var størri umboðan. Har luttóku nevniliga Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósið við liðum í báðum kappingunum.

Hjá gentum var munurin millum besta liðið, Ljósið, og lakasta liðið, Støkk, rættiliga stórur, meðan Havnar Fimleikafelag bert var trý stig aftanfyri Ljósið.

Hjá pinkum var einasta kappingin, har øll feløgini høvdu fullmannaði lið. Tann kappingin var rættiliga jøvn, men endin varð, at Støkk streyk av stað við sigrinum, eitt vet frammanfyri Havnar Fimleikafelag og eitt sindur meira frammanfyri Ljósið.

### Yngri mannfólk

Hjá mansunglingum var bara eitt lið, so har var ikki nógv at skriva heim um, men teir tríggir luttakararnir vóru rættiliga javnir í ymisku amboðunum.

Hjá dreingjum var somuleiðis bara eitt lið. Men har var ein fimleikari, sum kláraði seg betri enn hinir. Rani Petersen megnaði nevniliga at vera bestur í øllum amboðum, og tí eisini samanlagt.

Hjá piltum bleiv tað til eina ordiliga kapping. Ljósið hevði nevniliga eisini meldað lið til við fimm luttakarum, men teir kláraðu ikki at standa Havnar Fimleikarfelag kurl og máttu taka til takkar við øðrum og aftasta plássi.





Forskotna barran er eitt lutfalsliga nýtt amboð, sum flestu fimleikararnir hava trupulleikar við

# Vinnarar

**Kvinnur**
Støkk: Fríðhild R. Norðgerð, Kristina Toftegaard, Silja Højgaard og Anita Davidsen

**Kvinnuunglingar**
Støkk: Annika B. Hansen, Linda M. Hansen, Birita Debes og Durita Davidsen

**Gentur**
Ljósið: Marianna Eystberg, Jóna Holm, Eyðvør Samuelsen, Maria Jacobsen og Bjørt Olafsdóttir

**Pinkur**
Støkk: Marjun Jacobsen, Marta Nielsen, Kaia R. Norðgerð, Ása S. Carlsen og Bjørt Davidsen

**Menn**
Havnar Fimleikafelag: Rósing Dam, Øssur D. Eiriksfoss, Olivar D. Eiriksfoss, Bogi Berg og Ari Sakarisson

**Mansunglingar**
Havnar Fimleikafelag: Sofus Andreassen, Johan Petersen og Tór av Skarði

**Dreingir**
Havnar Fimleikafelag: Bartal Wardum, Aron Jacobsen, Heini M. Samson, Tóri Atlason og Rani Petersen

**Piltar**
Havnar Fimleikafelag: Jákup Jørgensen, Hannes Agnarsson, Christopher K. Eikhólm, Djóni Sakarisson og Rani Dalsgarð



Tá hvør kappingin er liðug, er altíð marsjur á skránni í fimleiki

# Soleiðis telja tey

**Enntá fimleikararnir sjálvir viðganga, at tað ikki altíð er so lætt, at vita hvør hevur klárað seg best í eini fimleikakapping. Men her royna vit at greiða eitt sindur frá tí**




Eirikur í Jákupsstovu

Í einstaklingakappingum í fimleiki er torført at vita, hvør er bestur, og í liðkappingum er hvaðna verri.

Men grundleggjandi gongur ein kapping fyri seg á henda hátt.

Upp til fimm fimleikarar kunnu vera á einum liðið. Av hesum sleppa fýra at kappast á hvørjum av teimum fýra ymisku amboðunum. Av hesum verða tríggir teir bestu taldir við, tá stigini verða givin.

### Amboðini

Tað eru heldur ikki somu amboðini, sum verða nýtt hjá kvinnum og monnum.

Hjá konufólki eru greinirnar: lop, biti, forskotin barra og gólv. Hvørt av amboðunum telur eins nógv.

Hjá konufólki eru greinirnar hesar: lop, ringar, paralell barra og gólv. Eisini her telur hvør greinin eins nógv.

Fyri at finna vinnaran í kappingini telur mann so stigini hjá trimum teimum bestu luttakarunum hjá hvørjum liði á øllum fýra amboðunum saman fyri hvørt liðið, og so verður vinnarin funnin.

### Tvey ymisk stig

Hyggja vit at hvørjum amboði sær, tá ein luttakari er farin í gongd, so verða stig fyrst givin fyri hvørji ting luttakarin ger. Í flestu amboðunum skulu ávísar rørslur gerast, og stig vera givin eftir, hvussu torførar hesar rørslur eru. Hesi stigini byrja frá 0.

Hitt stigið byrjar frá 10, og síðani verða øll mistøkini drigin frá tí.

Hetta vil í prinsippinum siga, at tú kanst vinna við lágum torleikastigið, um tú ikki gert nøkur mistøk. Um so er, at hini, sum eru á hægri torleikastigi, gera fleiri mistøk.

Men tá tað kemur til stykkis í amboðsfimleiki, so er lættast at hyggja eftir, hvat sær best út, tí oftast er tað hesin, sum eisini fær mest stig, tí tá er torleikastigið høgt og mistøkini fá.